# Dráttur trýsti Fleyr

**FLOGBÓLTUR**
**Kvinnurnar hjá Fleyr mugu sigast at hava fingið eina ynskibyrjan hetta kappingarárið, tí tær eru ájavnar við SÍ í oddanum í Eik-liguni**

Hilmar Jan Hansen

Men í gjár var kortini um reppið, at Dráttur spilti teimum spælið, tá liðini hittust í sera spennandi fimmsettara í Gundadalshøllini í Havn.

Dráttur legði væl út og vann tey bæði fyrstu settini. Serliga lá væl fyri hjá vágakvinnunum á gólvinum, tí talan var um nógvar og drúgvar duellir, sum Dráttur hevði betru evnini at avgera til egnan fyrimun. Fyrsta sett vann Dráttur 25-19 og annað sett 25-23.

Tá var Fleyr tó við at koma betur inn í dystin, og serliga var avgerandi munurin, ið eisini skuldi gera munin í síðsta enda, at Fleyr megnaði at



Mynd: Álvur Haraldsen

avgera álopini. Duellirnar fækkaðust, og tá Fleyr tók triðja og fjórða sett við ávikavist 25-20 og 25-14, vaks vónin um ein heimasigur.

Í fimta setti var tað framvegis Fleyr, ið hevði munin og vann 15-10, og sostatt kunnu kvinnurnar í Havn gleða seg um, at tær hava fult stigatal eftir fyrstu trý umførini. Dráttur eigur enn fyrsta sigurin á, men hann man fara at koma, tí í tveimum av teimum trimum dystunum higartil, hava tær akkurát verið ov stuttar í fimmsettarum.

hilmarjan@sosialurin.fo

# KÍF dramatiskan sigur

**FLOGBÓLTUR** **Liðið hjá KÍF, sum í fjør hevði ilt við at gera seg galdandi, var sera ungt og óroynt**

Hilmar Jan Hansen

Men nú eitt nýtt kappingarár er farið í gongd, er talan um eitt annað lið. Umframt at tær ungu eru blivnar eitt ár eldri og hava fleiri royndir, eru eisini onkrir meira rutineraðir spælarar á liðnum hjá KÍF.

Tað tilsamans munaði væl í gjár, tá kollfjarðarkvinnur vóru í Trongisvági og spældu ímóti TB, sum í fjør var FM-finalistur. Talan gjørdist um ein sera spennandi fimmsettara, ið endaði við sigri til KÍF.

Gestirnir løgdu betur fyri og vunnu tey bæði fyrstu settini, 25-22 og 27-25. Serliga var tað við góðum servutrýsti, at tað eydnaðist KÍF at vera omaná frá byrjan, og ikki fyrr enn í triðja og fjórða setti kom TB fyri seg.

Liðið hjá TB, ið millum annað má klára seg uttan landsliðsspælararnar, Katrin Petersen og Sólvá Dimon, umframt at Marina Popovic heldur ikki er við, spældi betur og betur og vann fyrst 25-18 í triðja setti og so 25-22 í fjórða setti.

Nú skuldi alt avgerast í fimta setti, og tað sá eisini í eina góða løtu út til, at TB skuldi fara avstað við øllum. Tá liðini skiftu síðu, var TB á odda 8-2, men allíkavæl eydnaðist KÍF at koma væl afturíaftur, og ímóti endanum vaks dramatikkurin bara. Men tá avtornaði, vann KÍF 16-14 í avgerandi settinum, og sostatt var fyrsti sigurin í vetur komin undir land.

# ÍF tók Mjølnir

**FLOGBÓLTUR** **Kvinnurnar hjá ÍF, sum í vetur hava styrkt seg við Maju Filipovic, vunnu ein heldur óvæntaðan sigur leygardagin**

Hilmar Jan Hansen

Tá tað eydnaðist teimum á heimavølli á Kambsdali at basa Mjølnir, sum í fjør leingi var ein av heitastu FM-kandidatunum. Eisini vann Mjølnir FK-kappingina herfyri.

Dysturin byrjaði sum væntað, tá Mjølnir tók fyrsta sett og vann 25-23, men síðani koppaði dysturin fullkomuliga og tók eina heldur óvæntaða vend, tí ÍF – rættiliga lætt enntá – fekk tikið síðstu trý settini við sannførandi úrslitum: 25-19, 25-17 og 25-12.

ÍF, sum í teimum báðum undanfarnu dystunum hevði tapt greitt fyri bæði SÍ og Fleyr, fekk sostatt síni fyrstu stig og kreyp upp á fimta pláss í Eik-liguni hjá kvinnum. Hjá Mjølnir, sum tó framvegis er við í fremra endanum, var ósigurin eitt skot fyri bógvin, hóast kappingin enn er ung.

hilmarjan@sosialurin.fo



*Kvinnurnar í Ternuni fingu ikki gjørt so nógv við SÍ í Sørvági leygardagin*

Mynd: Álvur Haraldsen

# Einki óvæntað

**FLOGBÓLTUR** **Tað tekur sína tíð at venja seg við spæl í bestu kvinnudeildini í flogbólti**

Hilmar Jan Hansen

Tað mugu kvinnurnar í Ternuni av Toftum sanna, hóast tær í trimum teimum fyrstu dystunum longu hava vunnið trý sett.

Leygardagin vóru tær í Ternuni í Sørvági og spældu ímóti SÍ, og dysturin fekk ikki annað úrslit, enn tey flestu høvdu roknað við frammanundan.

SÍ streyk avstað beinanvegin og gjørdi sær dælt av, at Ternan slett ikki var við fyrstu løtuna. Tí gjørdist tað til sannførandi 25-11 í fyrsta setti. So mikið sannførandi var tað, at SÍ hevði ikki sørt hug at taka tað meira róligt, og tí gjørdist tað ikki so lætt at vinna tey bæði seinnu settini.

Ternan kom munandi betur við, so tey endaðu 25-20 og 25-21 til SÍ, ið tók ongantíð var í vanda fyri at lissa kravda sigurin. Og á stigatalvuni hevur meistaraliðið í Sørvági eisini fult stigatal eftir fyrstu trý umførini.

hilmarjan@sosialurin.fo

**ÍF - Mjølnir** 3-1
(23-25, 25-19, 25-17, 25-12)

**Fleyr - Dráttur** 3-2
(19-25, 23-25, 25-20, 25-14, 15-10)

**SÍ - Ternan** 3-0
(25-11, 25-20, 25-21)

**TB - KÍF** 2-3
(22-25, 25-27, 25-18, 25-22, 14-16)

## Eik-ligan *kvinnur*

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNIÐ | TAPT | VUNNIN SETT | TAPT SETT | MUNUR | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | SÍ | 3 | 3 | 0 | 9 | 1 | 8 | 6 |
| 2 | Fleyr | 3 | 3 | 0 | 9 | 2 | 7 | 6 |
| 3 | Mjølnir | 3 | 2 | 1 | 7 | 4 | 3 | 4 |
| 4 | TB | 3 | 2 | 1 | 8 | 7 | 1 | 4 |
| 5 | ÍF | 3 | 1 | 2 | 3 | 7 | -4 | 2 |
| 6 | KÍF | 3 | 1 | 2 | 4 | 8 | -4 | 2 |
| 7 | Dráttur | 3 | 0 | 3 | 4 | 9 | -5 | 0 |
| 8 | Ternan | 3 | 0 | 3 | 3 | 9 | -6 | 0 |